P/F reg. nr. 6115

P/F NORDIKLÍV LÍVSTRYGGINGARFELAG

HÁLVÁRSFRÁSØGN

INTERIM REPORT

1. HÁLVÁR 2025

H1 2025

Innihaldsyvirlit / Table of contents

Notes to users of the English version of this document:

- This document contains a Faroese version as well as an English version. In the event of any dispute regarding the interpretation of any part of the document, the Faroese version of the document shall prevail
- To ensure the greatest possible applicability of the English version of the document, British English terminology has been used

Upplýsingar um felagið / Company Information

Felagið / The Company

Navn / Name:	P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag
Heimstaður / Domicile:	Oknarvegur 5, 100 Tórshavn
Skrásetingarnummar / Registration number:	6115
Roknskaparár / Fiscal year	11

Nevnd / Board of Directors

Brian Smedemark, nevndarformaður / chairman of the board
Turið F. Arge, nevndarlimur / board member
Christian Clemmensen, nevndarlimur / board member
Jákup Arnhold Olsen, nevndarlimur / board member

Stjórn / CEO

Anna Mohr Holm

Grannskoðarar / Auditors

PricewaterhouseCoopers, Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki P/F

Arndis Poulsen
Innanhýsis grannskoðan / Internal auditor

5 ára yvirlit / 5-year Financial Highlights

Høvuðstøl kr. 1.000 / Key figures 1.000 DKK

Rakstur / Income statement

Rakstur	1. hálvár 2025	1. hálvár 2024	1. hálvár 2023	1. hálvár 2022	1. hálvár 2021
Tryggingargjøld / Insurance premiums	9.426	9.303	9.250	7.241	7.438
Tryggingarveitingar / Insurance claims	-2.696	-2.470	-3.836	-727	2.700
Úrslit av íløguvirksemi / Result from investment activities	22	973	482	-948	-243
Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi / Operational cost from insurance	3.450	3.410	3.373	2.678	2.585
Úrslit av endurtrygging / Result from business ceded	-181	-332	-261	-433	-103
Tryggingartekniskt úrslit / Technical result	3.306	4.192	2.229	2.834	1.979
Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutrygging / Technical result from health and accident insurance	456	1.202	1.036	670	545
Hálvársúrslit / Net Profit	3.103	5.221	3.073	2.096	1.871

Fíggjarstøða / balance sheet					
Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt / Provisions for insurance and investment contracts Total	5.898	6.529	5.192	5.964	4.077
Eginogn í alt / Equity Total	35.124	37.570	35.559	34.835	33.794
Ogn í alt / Assets Total	45.604	48.538	46.096	44.420	41.403

Lyklatøl / Ratios					
Úrslit av íløguvirksemi í prosent av marknaðarrentuproduktum / Result of investment in percent of market rate products	0,0%	9,3%	5,9%	-13,9%	8,9%
Váði á úrsliti av íløguvirksemi av marknaðarrentuproduktum / Risk on result of investment of market rate products	3,25	3,25	3,25	3,50	3,25
Kostnaðarprosent av avsetingum	30,6%	26,9%	32,5%	22,7%	34,2%
Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan, við niðurskalering upp á 0,1 av samlagstryggingum / Cost per insured with downscaling of 0,1% of Group insurance	5.346	5.256	5.120	4.059	3.986
Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan - / Cost per insured -	535	526	512	406	399
Renting av eginogn eftir skatt / Return on equity after tax	8,1%	14,3%	8,8%	6,1%	5,7%
Solvensdekningur / Solvency coverage	134,5%	143,4%	136,3%	133,8%	130,1%

Sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi / Health and accident insurance					
Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio	57,6%	19,3%	24,2%	41,2%	32,4%
Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio	21,1%	21,3%	21,2%	18,2%	23,4%
Combined Ratio / Combined Ratio	78,7%	40,6%	45,4%	59,4%	55,8%

5 árayvirlitið er gjørt við støði í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum, (kunngerð nr. 4). / 5-year highligths is done based on Order (kunngerð) of Annual Reports for insurance companies and insirance holding companies, (order no 4).

Leiðslufrágreiðing

Eigaraviðurskifti
NordikLív rekur pensjóns- og lívstryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum. NordikLív er dóttirfelag hjá Føroya Banka, sum eigur allan partapeningin í felagnum.

Endamál
Endamálið hjá felagnum er at virka á føroyska lívstryggingarmarknaðinum. Nú hevur Føroya Banki tó gjørt samstarvsavtalu við LÍV, og verður NordikLív í tí sambandi avtikið pr. 1. januar 2026. Allar tryggingar fluttar til LÍV pr. 1. september 2025.

Gongdin í fyrra hálvári
Gongdin í fyrra hálvári 2025 var góð.

Bruttotryggingargjøldini eru nú 9.426 tkr. í mun til 9.303 tkr. fyrra hálvár í 2024.
Skaðaútreiðslurnar vóru nakað hægri enn í fyrra hálvári 2024. Skaðaútreiðslurnar vóru 2.696 tkr. samanborið við 2.470 tkr. sama tíðarskeið í fjør.

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist 3.106 tkr. samanborið við 4.192 tkr. sama tíðarskeiði í 2024.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 3.784 tkr., sum er betri enn væntað, men nakað væl lægri enn sama tíðarskeið í fjør, tá úrslitið var 6.367 tkr.

Fíggjarstøðan
Fíggjarstøðan javnvigaði við 45.604 tkr. tann 30. juni 2025. Við árslok 2024 var fíggjarstøðan 48.538 tkr. Lívstryggingaravsetingar vóru 5.898 tkr. ímóti 6.529 við árslok 2024. Eginpeningurin tann 30. juni 2025 var 35.124 tkr., ímóti 37.570 tkr. við árslok 2024.

Framtíðarvánir
Útlitini fyri 2025 eru góð, tó at tey eru merkt av, at sum liður í eini størri ætlan um at einfalda virksemið í samtakinum, verður alt virksemið hjá NordikLív avtikið pr. 1. januar 2026.
Fyri framhaldandi at kunna veita kundunum ráðgeving og lívstryggingar til kappingarførar prísir, hevur Føroya Banki í staðin gjørt samstarvsavtalu við Tryggingarfelagið LÍV.
Allar tryggingar í NordikLív, sum higartil eru blivnar umsitnar av Forenede Gruppeliv, verða fluttar til LÍV pr. 1. september 2025.
Leiðslan roknar við, at úrslitið verður millum 3.000 tkr. og 4.000 tkr.

Aðrar upplýsingar
Ongar hendinger eru farnar fram síðani 30. juni 2025, sum hava avgerandi ávirkan á rakstur og fíggjarligu støðu felagsins.

Útveiting og vitanartilfeingi
Allar umsitingarligar uppgávur eru útveittar við útveitingaravtalum. Felagið hevur gjøgnum útveitingaravtalurnar tryggjað sær, at øll sum taka sær av uppgávum felagsins hava holla vitan innan økið.

Stýring av váða
Váði er í øllum viðurskiftum, sum ávirka møguleikar felagsins á ein hátt, sum gera tað truplari at røkka settu málunum. Settar eru í verk yvirskipaðar leiðreglur, sum leiðslan ansar eftir vera fylgdar, sí notu 2.

Íløgur, burðardyggar og etiskar
NordikLív bjóðar íløguloysnir, ið eru lagaðar til tíðarkarmin og váðafýsnið hjá tí einstaka kundanum. Harumframt verður stórur dentur lagdur á burðardygd í okkara íløgutænastum. Í ár er fjórðu ferð, at NordikLív fær tøl fyri CO_2-útlátið av íløgunum. Hesi tølini geva henta vitan, sum gera okkum før fyri at málrætta avrikini í sambandi við tær íløgutænastur, ið NordikLív brúkar. Av tí at alsamt fleiri fyritøkur máta teirra CO_2-spor, menninst dátagrundarlagið og verður betri.

Á íløguøkinum samstarvar NordikLív við BankInvest, sum leingi hevur arbeitt við at máta og minka um CO_2-útlátið í teirra íløgutænastum. Fyri okkara kundar merkir samstarvið við BankInvest betri gjøgnumskygni av "environmental", "social" og "governance" (ESG) faktorum. Hetta sæst millum annað við, at íløgurnar verða bólkaðar eftir, um tær eru 1) burðardyggar, 2) partvíst burðardyggar ella 3) uttan serligt samfelagsligt ella umhvørvisligt atlit. Hesar verða kallaðar ávikavist grein 9-, grein 8- og grein 6-

vørur, sum er ES-lógarkrav at bólka íløgur í (Sustainable Finance Disclosure Regulation, SFDR). Ítøkiliga merkir hetta eisini, at íløgutænasturnar, sum NordikLív bjóðar, eru kravdar at hava eina ætlan fyri minking av CO_2-útlátinum. Nærri frágreiðing um íløgurnar finst á heimasíðuni hjá móðirfelagnum: Burðardyggar íløgur og hjá íløgufelagnum: https://bankinvest.dk/baeredygtighed/

Kapitalur
Kapitalstyrkin hjá NordikLív í mun til tryggingarskyldurnar sæst í yvirlitinum niðanfyri:

DKK 1.000	**30. juni 2025**	**30. juni 2024**
Eginogn	35.124	37.570
Grundarfæfeingi	37.124	39.570
Fæfeingiskrav	27.601	27.593
Kapitalstyrki	9.523	11.977

Tann 30. juni 2025 var kapitalstyrkin hjá felagnum 9,5 mió.kr. í mun til 12,0 mió.kr. tann 30. juni 2024. Mett verður, at felagið hevur neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til galdandi lógarkrøv. Fæfeingiskravið er 3,7 mió evrur umroknað til 27.601 tkr.

Solvensur
Individuella solvenskravið tann 30. juni 2025 var 17.182 tkr., meðan kapitalgrundarlagið til at lúka solvenskrøvini var 37.124 tkr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og á einum støði, ið leiðslan er nøgd við.

Solvensdekningurin pr. 30. juni 2025 var 1,35. Solvensdekningurin sama tíðarskeið í fjør var 1,43.

Management's Review

Purpose
The purpose of the company is to operate within the Faroese market by offering pension and insurance services.

As part of simplifying the Group's structure, Føroya Banki has entered into a cooperation agreement with LÍV. Consequently, NordikLív will be discontinued as of 1 January 2026, and all insurance policies will be transferred to LÍV on 1 September 2025.

Result for the Period
Developments in the first half of 2025 have been positive.

Gross premiums written amount to DKK 9.426 thousand compared to DKK 9.303 thousand in the first half of 2024.
Claims are slightly higher than in the corresponding period in 2024, at DKK 2.696 thousand in H1 2025 compared to DKK 2.407 thousand in the same period last year.

The technical result was DKK 3.306 thousand in H1 2025, compared to DKK 4.192 thousand in the same period in 2024.

Profit before tax was DKK 3.784 thousand, which is lower than in the same period last year, as expected. For comparison, profit before tax in H1 2024 tax was DKK 6.367 thousand.

Balance Sheet
The balance was DKK 45.604 thousand as of 30 June 2025. At year-end 2024, the balance was DKK 48,538 thousand. Provisions for insurance and investment agreements amounted to DKK 5.898 thousand, compared to DKK 6.529 thousand at year-end 2024.
Equity was DKK 35,124 thousand as of 30 June 2025, compared to DKK 37,570 thousand at year-end 2024.

Outlook
The outlook for 2025 is positive, although it is impacted by the decision to cease operations as of 1 January 2026, as part of a broader initiative to simplify operations within the group.
To continue offering customers financial advice and life insurance products at competitive prices, Føroya Banki has instead entered into a cooperation agreement with the life insurance company LÍV.
All insurance policies in NordikLív, which have until now been administered by Forenede Gruppeliv, will be transferred to LÍV as of 1 September 2025.
Management expects the result for the year to be between DKK 3.000 thousand and DKK 4.000 thousand.

Other Information
No events have occurred since 30 June 2025, which are of material significance to the company's financial or operating position.

Outsourcing and Knowledge Base
All administrative tasks have been outsourced under formal outsourcing agreements. In these agreements, the company has ensured that all individuals responsible for the company's tasks posess thorough knowledge and expertise within their respective areas.

Risk Management
Risk inherent in all circumstances that affect the company's ability to achieve its stated objectives. General guidelines have been implemented under the supervision and responsibility of the management, see also Note 2.

Investments and Sustainability
NordikLív offers investment solutions tailored to each customer's time horizon and risk appetite. In addition, great emphasis is placed on sustainability within our investment services. This year marks the fourth time NordikLív has received data on the CO_2 emissions associated with its investments. These figures provide valuable insights that enable us to more effectively target performance within the

investment services used by NordikLív. As more companies measure their carbon footprint, the data foundation continues to improve in both scope and quality.
In the investment area, NordikLív cooperates with BankInvest, which has long worked on measuring and reducing CO_2 emissions in its investment services. For our customers, the partnership with BankInvest results in improved transparency regarding environmental, social, and governance (ESG) factors. This is reflected in the classification of investments according to whether they are 1) sustainable, 2) partially sustainable, or 3) without specific environmental or societal considerations. These are referred to as Article 9, Article 8, and Article 6 products, respectively – classifications required by EU regulation under the Sustainable Finance Disclosure Regulation (SFDR).
Specifically, this also means that the investment services offered by NordikLív are required to have a plan for reducing CO_2 emissions. Further details on our investment approach can be found on the parent company's website:
Sustainable investments and from our investment partner: https://bankinvest.dk/baeredygtighed/

Capital Strength
NordikLív's capital strength in relation to its insurance obligations is presented in the overview below:

DKK 1,000	**30 June 2025**	**30 June 2024**
Equity	35.124	37.570
Base capital	37.124	39.570
Capital requirement	27.601	27.593
Capital strength	9.523	11.977

As of 30 June 2025, the company's capital strength was DKK 9.5 million, compared to DKK 12.0 million as of 30 June 2024.
It is assessed that the company maintains the necessary financial strength to meet current regulatory requirements.
The capital requirement amounts to EUR 3.7 million, equivalent to DKK 27,601 thousand.

Solvency and Individual Solvency Requirements
The individual solvency requirement was DKK 17,182 thousand on 30 June 2025, while the company's eligible base capital amounted to DKK 37,124 thousand. This reflects a relatively strong solvency ratio, with which the management is satisfied.

The solvency ratio relative to the Capital requirement was 1.35 at 30 June 2025, compared to 1.43 at 30 June 2024.

Ownership
NordikLív is a wholly owned subsidiary of Føroya Banki P/F, which holds 100% of the share capital.

Rakstrarroknskapur / Income statement

DKK 1.000	2025	2024
Tryggingargjøld brutto / Gross premiums written	9.426	9.303
Endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums	181	332
Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Earned premiums, net of reinsurance	**9.245**	**8.972**
Rentuinntøkur og vinningsbýti vm / Interest and dividends, etc.	323	236
Virðisjavningar / Value adjustments of investment assets	-209	842
Rentuútreiðlsur / Interest expenses	70	86
Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi / Administration cost related to investment activity	21	19
Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments	**22**	**973**
Útgoldnar veitingar / Claims paid	2.696	2.470
Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt / Claims incurred, net of reinsurance	**2.696**	**2.470**
Broyting í lívstryggingaravsetingum / Change in gross provisions for life insurance	-207	-1.100
Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt / Change in gross provisions for life insurance	**-207**	**-1.100**
Útveganarkostnaðir / Acquisition costs	2.363	2.320
Fyrisitingarkostnaður / Administrative expenses	1.087	1.090
Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total insurance operating expenses, net of reinsurance	**3.450**	**3.410**
Flutt úrslit av íløguvirksemi / Total return on investments	**-22**	**-973**
Tryggingarteknisk úrslit / Technical result	**3.306**	**4.192**
Tryggingarteknisk úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi / Technical result of health and accident insurance	**456**	**1.202**
Íløguúrslit av eginognini / Return on investment allocated to equity	**22**	**973**
Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax	**3.784**	**6.367**
Skattur / Tax	681	1.146
Ársúrslit / Profit for the year	**3.103**	**5.221**

Ogn / Assets

DKK 1.000	2025	2024
Íløguprógv / Unit trust certificates	31.770	30.087
Lánsbrøv / Bonds	4.999	14.116
Innlán í kreditfeløgum / Cash and cash equivalents	4.397	3.777
Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt / Investment assets	**41.165**	**47.980**
Íløguogn í alt / Total investment assets	**41.165**	**47.980**
Íløguogn tengd at marknaðarrentuproduktum í alt / Investment certificates linked to marked interest rate products	**3.543**	3.555
Onnur áogn / Other assets	871	0
Áogn í alt / Receivables	**871**	**0**
Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent	25	89
Tíðaravmarkingar í alt / Prepayments	**25**	**89**
Ogn í alt / Total assets	**45.604**	**51.624**

Fíggjarstøða / Balance

Skyldur / Equity and liabilities

DKK 1.000	2025	2024
Partapeningur ella ábyrgdarpeningur / Share capital	20.000	20.000
Yvirkursur við partabrævaútgávu / Additional paid in capital	10.000	10.000
Framflutt úrslit / Retained earnings	5.124	2.021
Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends	0	9.000
Eginogn í alt / Equity	**35.124**	**41.021**
Onnur ábyrgdarlán / Other subordinated loan capital	2.000	2.000
Ábyrgdarlán í alt / Total other subordinated loan capital	**2.000**	**2.000**
Lívstryggingaravsetingar / Life insurance provisions	5.636	5.855
Avsett til skaðaendurgjøld / Gross provisions for claims	262	390
Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt / Total provisions for insurance and investment contracts	**5.898**	**6.245**
Skuld til atknýtt virkir / Debt to related parties	0	287
Beinleiðis skattur / Tax	2.585	1.904
Onnur skuld / Other payables	-2	168
Skuld í alt / Total debt	**2.582**	**2.358**
Tíðaravmarkingar / Prepayments	**0**	**0**
Skyldur í alt / Total equity and liabilities	**45.604**	**51.624**

Notur / Notes

Nota 1 - Nýttur roknskaparháttur

Hálvársfrásøgnin hjá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldsfelagsskapum.

Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til ársroknskapin fyri 2024. Víst verður tí eisini til brotið um nýttan roknskaparhátt í ársroknskapi felagsins fyri 2024.

Grannskoðan ella gjøgnumgongd
Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin

Note 1 - Basis of Preparation of the H1 Financial Statements

The interim financial statement of P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag has been prepared in accordance with The Insurance Act (Tryggingarlógin) and Executive Orders no. 4 from 27 June, 2018 on financial reports presented by insurance companies and holding companies.

The accounting policies are unchanged in respect to the Annual Report for 2024. For reference see also the section with Accounting Policies in the 2024 Annual Report.

Audit and Review
No audit or review has been done to this interim report by the internal or external auditors.

Notur / Notes

Nota 2 - Stýring av váða

Váði er í øllum viðurskiftum, sum ávirka møguleikar felagsins á ein hátt, sum gera tað truplari at røkka settu málunum. Settar eru í verk yvirskipaðar leiðreglur, sum leiðslan ansar eftir vera fylgdar.

Note 2 - Risk Management

An element of risk exists in all circumstances that affect the company’s possibilities in such a way to make it difficult to reach the objectives set. General guidelines have been put into effect under the supervision and responsibility of the management.

Nota 2 (framhald)

Marknaðarváðar

Týdningarmestu váðarnir	Val í mun til váðar	Váðalækkandi virksemi
Rentuváði	Málið við íløguvirksemi felansins er at fáa sum mest avkast við einum ásettum váðastøði, sum nevndin ásetur Miðað verður eftir eini skilagóðari spjaðing av íløgunum	Nevndin í NordikLív hevur samtykt ein íløgupolitikk, sum ásetir karmarnar fyri íløgur felagsins. Íløgupolitikkurin verður dagførdur eftir tørvi ella í minsta lagi árliga. Spjaðingarváðin er avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymisk lánsbrøv. Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í lánsbrøvum, sum eru skrásett í keypsskálum. Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at hava mørk fyri, hvussu stór íløga kann gerast í einstøkum mótparti.

Tryggingarváðar

Týdningarmestu váðarnir	Val í mun til váðar	Váðalækkandi virksemi
Livitíð Deyðstíttleiki Avlamistíttleiki Spjaðing	Lønandi virksemi á øllum tryggingar-produktum. Váðaspjaðing millum tryggingar- og kundabólkar Avmarkandi úrslitsávirkan frá ein-støkum skaðahendingum við endur-trygging	Felagið brúkar prísásetingaramboð, sum taka hædd fyri váðunum og marknaðar-støðuni. Greiðar inntekningarreglur. Váðajavning við endurtrygging og við hámørkum fyri ymsum tryggingar-dekningum. Gott dátugrundarlag.

Operasjonellur váði

Týdningarmestu váðarnir	Val í mun til váðar	Váðalækkandi virksemi
KT-váðar Løgfrøðiligir váðar Umsitingarligir váðar Svik Umdømi Strategi	Ásannað verður, at ikki slepst undan rakstrarligum váðum, men hesir skulu avmarkast til støðið, sum nevndin góðtekur.	Felagið avmarkar operasjonella váðan við leiðreglum, innaneftirliti og funksjónskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingar-før. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan.

Note 2 (continued)
Market Risks

Most Significant Risks	Efforts Regarding Risk	Risk Reducing Activities
Interest risk	The purpose of the company's investment activities is to achieve the best possible return with a risk level determined by the board A sound diversification of the investments is the target.	The board of directors of NordikLív have adopted an investment policy, which sets the foundation for the company's investments. The investment policy is updated when necessary or at least annually. Diversification risk is limited by diversifying the company's investments in various bonds. The liquidity risk is limited by maintaining a significant part of the investments in cash and listed bonds. Counterparty risk is limited e.g. by having limits on the size of an investment in individual counterparty.

Insurance Risks

Most Significant Risks	Efforts Regarding Risk	Risk Reducing Activities
Life duration Mortality rate Rate of disability Diversification	Profitable activities on all insurance products. Risk diversification between insurance and customer groups Limited result effect from single damage events using reinsurance.	The company uses pricing tools that take risk and market situation into account. Clear rules for drawing-up. Risk diversification using reinsurance and by maintaining limits on different insurance coverage. Sound data foundation.

Operational Risk

Most Significant Risks	Efforts Regarding Risk	Risk Reducing Activities
IT-risks Legal risks Administrative risks Irregularities Reputation Strategy	There is no avoiding operational risks, however, these must be limited to a level approved by the board of directors.	The company limits operational risk through guidelines, internal supervision and separation of functions. This is continuously reassessed and updated. In addition to this, the company closely monitors market developments in order to make sure that prices are service level remain competitive. Great emphasis is placed on good customer service in addition to openness and transparency in communication with customers.

Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2025 hjá P/F NordikLív Lívstryggingarfelag.

Hálvársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at hálvársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarstøðuni tann 30. juni 2025 og úrsliti av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar 2025 til 30. juni 2025.

Okkara fatan er, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í P/F NordikLív Lívstryggingarfelag og fíggjarligu støðuni og eina lýsing av teim týdningarmestu váðunum og óvissu tættunum, sum kunnu koma at ávirka felagið.

Tórshavn, tann 1 August 2025

Stjórn:

Anna Mohr Holm

Nevnd:

Brian Smedemark, Chairman	Christian Clemmensen
Turið F. Arge	Jákup Arnhold Olsen

Statement by the Management

The Board of Directors and the Management Board have today considered and approved the interim report of P/F NordikLív Lívstryggingarfelag for the six months ended 30 June 2025.

The interim financial statements have been prepared in accordance to the regulatory requirements.

In our opinion, the management's report includes a true and fair view of the company's assets and liabilities, and the balance sheet as of 30 June 2025 and of the result of the company's operations for the period 1 January 2025 to 30 June 2025.

We consider the management's report to give a fair representation of the development of P/F NordikLív Lívstryggingarfelag and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

Tórshavn 1 August 2025

Executive Board:

Anna Mohr Holm

Board of Directors:

Brian Smedemark, Chairman

Christian Clemmensen

Turið F. Arge

Jákup Arnhold Olsen